# vunnu greitt







*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Aksel og Sigrun eru føroyameistarar

**BADMINTON** Aksel Poulsen er føroyameistari triðja árið upp í slag í einmansleiki. Sigrun Smith vann hjá kvinnunum

Uni Holm Johannesen

Aksel Poulsen vann sannførandi á Niclasi Eysturoy í finaluni. Hann vann bæði settini. Aksel Poulsen tóktist hava tamarhald á dystinum allatíðina, meðan Niclas framdi nógv mistøk.

Tað merkist serliga væl, at báðir høvdu spælt fleiri dystir frammanundan. Báðir tóku lut í finaluni í tvímansleiki. Aksel var við yvirlutan í hesum seinasta dystinum og vann uppiborið.

Sigrun Smith vann føroyameistaraheitið fyri aðruferð. Hon vann seg eisini upp á føroyska tindin í 2009. Hon vann á 15 ára gomlu Rannvá Djurhuus Carlsson í finaluni. Sigrun var við undirlutan í fyrsta settinum, men so svaraði hon aftur. Settúrslitini vóru 19-21, 21-13 og 21-16.

*uni@sosialurin.fo*

# Ragnar og Henriette eru best

**BORÐTENNIS** Henriette Nielsen vann sítt fyrsta føroyameistaraheitið í einmansleiki fyri kvinnur, og Ragnar Eginsson staðfesti, at hann er føroya besti borðtennisspælari

Uni Holm Johannesen

Ragnar Eginsson, sum hevur fingið seg royndan í donsku kappingini seinastu tíðina, var ruddiliga í finaluni. Mótstøðumaðurin Petur Niclasen, sum hevur verið venjari hjá Ragnari Eginsson, hótti so at siga ongantíð. Ragnar Eginsson vann 4-0. Settúrslitini vóru 11-5, 11-5, 11-7 og 11-6.

Henriette Nielsen vann greitt á Rakul Mikkjalsdóttir í finaluni í einmansleiki fyri kvinnur. Úrslitið var 4-1. Tað er fyrstu ferð, at hon er føroyameistari.

*uni@sosialurin.fo*

# Tvær gull til Niclas

**BADMINTON** Niclas Eysturoy var fremst í bæði tvímansleiki hjá monnum og blandaðum tvímansleiki

Uni Holm Johannesen

Niclas Eysturoy var tvífaldur gullvinnari á stóra finaludegnum í høllini á Hálsi um vikuskiftið. Hann var fremstur í tvímansleiki hjá monnum og blandaðum tvímansleiki. Hann og Hilmar Kass vunnu á brøðurnum Benjamin Gunnarstein og Nicolai Gunnarstein í tvímansleiki hjá monnum. Settúrslitini vóri 21-17 og 21-17.

Í blandaðum tvímansleiki vunnu Niclas Eysturoy og Sigrun Smith á Rannvá Djurhuus Carlsson og Aksel Poulsen.

Í tvímansleiki hjá kvinnum vóru Guri Poulsen og Sigrun Smith betur enn hinar. Tær vunnu 2-0 á finaluni á møggunum Bjørg Djurhuus og Rannvá Djurhuus Carlsson.

*uni@sosialurin.fo*

# NEMA FM 2011

**BORÐTENNIS:**

**Tvímansleik, kvinnur:**
Rakul Mikkjalsdóttir og Henrietta Nielsen
**Tvímansleik, menn:**
Petur Niclasen og Pætur Albinus
**Blandaður tvímansleikur:**
Henrietta Nielsen og Ragnar Egilsson
**Einstaklingar, kvinnur:** Henrietta Nielsen
**Einstaklingar, menn:** Ragnar Egilsson

**BADMINTON:**

**Tvímansleik, kvinnur:**
Guri Poulsen og Sigrun Smith
**Tvímansleik, menn:**
Niclas Eysturoy og Hilmar Kass
**Blandaður tvímansleikur:**
Niclas Eysturoy og Guri Poulsen
**Einstaklingar, kvinnur:** Sigrun Smith
**Einstaklingar, menn:** Aksel Poulsen

**JUDO:**

**Menn, undir 73 kilo:** Hjalmar Johannesen
**Menn, opin bólkur:** Ragnar við Streym